Bjarni Djurholm, landsstýrismaður

# Kalsoy dømi um politiskan vilja

**- Ásannast má, at eitt væl útbygt og væl virkandi samferðslukervi – við vegum, tunlum og ferjulegum – hevur alstóran týdning fyri trivnaðin í útjaðaranum, fyri vinnuna og fólkið sum heild. Alt verður ikki gjørt eftir einum degi, men Kalsoyggin er eitt dømi um politiskan vilja tvørtur um floksmørk at betra um viðurskiftini hjá fólki á útoyggj, segði landsstýrismaðurin**

KALSOYGGIN
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Í røðu síni við nýggju ferjuleguna á Syðradali týsdagin, endurgav landsstýrismaðurin í samferðslumálum, Bjarni Djurholm, ein norskan verkfrøðing, H. Horn, sum fyri hundrað árum síðan tók soleiðis til í einum áliti um framtíðar vegagerð í Føroyum:

"På Kalsø og Kunø kan der neppe blive spørgsmål om veibygning, men går man først igang med veibygning på øerne, så vil der stadig melde sig nye krav og i fremtiden vil man få se vei på steder, hvor man nu vil anse det uoverkommeligt at skaffe fremkomst.."

- Men á Kalsoynni gongur sjón fyri søgn, vísti Bjarni Djurholm á. Koyrandi er millum allar bygdir í oynni, og tað hevði neyvan nakar ímyndað sær fyrst í farnu øld.

### Fløskuhálsur burtur

Landsstýrismaðurin segði, at hóast møguleikarnir fyri bilaferðslu í oynni vórðu betraðir munandi, tá ið tunlarnir gjørdust veruleiki, hevur ferjusambandið millum Klaksvíkina og Syðradal verið ein týðandi fløskuhálsur.

- Her hevur Barskor nú í eitt langt áramál verið álitið, og hóast hann hevur roynst væl, skerst ikki burtur, at hetta er eitt gamalt og ótíðarhóskandi skip – uttan møguleikar fyri akfarsflutningi. Nú kann Barskor leggja frá sær, eftir at hann trúfastur hevur tænt oynni í nógv ár.

Bjarni segði, at ótíðarhóskandi ferjusambandið millum Klaksvíkina og Syðradal var orsøkin til, at samferðsluhavnin í Kalsoynni varð raðfest so frammarliga politiskt.

- Og her hava vit so ítøkiliga úrslitið, nú vit í dag skulu taka nýggju samferðsluhavnina alment í nýtslu. Tað er ikki fyrr enn nú, segði landsstýrismaðurin, at kalsoyingar fáa fullu nyttuna burtur úr vegasambandinum í oynni.

Hann fegnaðist um, at við stuttum millumbili eru tvær samferðsluhavnir tiknar í nýtslu í Føroyum, onnur í Suðuroy og nú hendan í Kalsoynni, sum er eitt valaverk, ið ger tað møguligt at seta eina bilferju í sigling millum Kalsoynna og miðstaðarøkið.

- Hetta eru tvær havnir, sum komandi árini fara at betra um liviumstøðurnar hjá íbúgvunum í útjaðaranum.

### Havnabygging

Landssýrismaðurin vísti á, at við nýggju ferjuleguni hava kalsoyingar skrivað seg inn í føroysku samferðslusøguna og soleiðis lyft arvin eftir teir, sum gingu undan.

- Mær er sagt, at fyrsta veruliga atløgubryggjan í Kalsoynni varð bygd í 1930. So, í veruleikanum er talan um eitt 75-ára jubileum í ár.

Hann segði, at tað var Palli Norðuri í Stovu, sum





*Tað var landsstýrismaðurin í samferðslumálum, Bjarni Djurholm, sum klipti snórin og kunngjørdi, at nú er nýggja samferðsluhavnin á Syðradali alment tikin í nýtslu*

*Mynd: Bárður Lydersen*

# Kalsoy: Ein nýggj tíð við nýggju



*... og tað var Oyvindur Brimnes, landsverkfrøðingur, sum alment handaði Strandfaraskipum Landsins nýggju samferðsluhavnina á Syðradali til nýtslu*

*Mynd: Bárður Lydersen*

KALSOYGGIN
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Oyvindur Brimnes, landsverkfrøðingur og Andras Jensen, deildarleiðari á Strandfaraskipum Landsins, søgdu eisini nøkur orð við móttøkuna á Syðradali.

Tað var landsverkfrøðingurin, sum alment handaði Strandfaraskipum Landsins nýggju samferðsluhavnina til nýtslu.

Oyvindur Brimnes geiddi frá, hvussu gongdin hevur verið í Kalsoynni – við tunnilsbyggingum og nú við nýggjari ferjulegu.

Í stuttum lýsti hann, hvat arbeiði liggur aftanfyri eina slíka verkætlan sum hesa – við eitt nú aldumátingum, modell-royndum, projekteringum, sáttmála og seinni við trupulleikum við brimskaðum, vánaligum gróti og botnviðurskiftum.

Vegna Landsverk takkaði hann løgtingi, landsstýri, kommunu, Landsbyggifelagnum, arbeiðstakara, arbeiðsfólkinum og øðrum fyri samstarvið.

- Eg enda ynski eg tykkum øllum góða eydnu við havnini – og við hesum handi eg hana til Strandfaraskip Landsins at nýta, segði Oyvindur Brimnes.

Í røðu síni greiddi Andras Jensen, deildarleiðari hjá SL, frá leiklutinum hjá